# Ljóð úr látrinum

**Onnur solo-fløgan hjá Hans Peturi í Brekkunum er nú komin á marknaðin**

ÚTGÁVA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Látraljóð er heitið á nýggjari solofløgu, sum Hans Petur í Brekkunum gevur út í hesum døgum.

Talan er um næstu soloútgávuna hjá føroyska alt- og sopran saxofonistinum, og sum navnið bendir á, so er talan ikki um heilt vanligan tónleik, soleiðis sum fólk flest eru von við at lurta eftir tónleiki.

Talan er nevnliga um live-upptøkur av grottukonsert, sum Hans Petur á sumri 2003 framførdi í Klæmintsgjógv undir Hestoynni. Klæmintsgjógv er á leið 200 metra djúp, og saman við ævigu undirtónunum frá sjónum gevur hetta ein heilt serligan akustik, ið við tíðini er vorðin at kalla ein søluvøra hjá føroyskum tónlistafólkum.

Tað er plátufelagið, Tutl, sum stendur aftan fyri útgávuna av fløguni, sum eisini stuðlað av Fjølrit, Landspeningi hjá KODA, Gramexgrunninum, Mentanargrunni Landsins og DMF.

Fløgan kostar 100 kr., og er hon at fáa í søluhandlum kring alt landið. Eisini ber til at ogna sær fløguna á heimasíðunum, www.tutl.com, og www.hanspetur.net.



*Hans Petur í Brekkunum gevur nú næstu soloútgávuna út*

# Eivør í kanadiskum samstarvi

**Eivør Pálsdóttir og kanadisku fólkatónleikarin Bill Bourne fara at spæla saman á G! festivalinum, og ætlanin er, at samstarvið skal halda fram við einari nýggjari fløgu hjá Eivør**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Eivør Pálsdóttir hevur gjørt nýtt samstarv við kenda kanadiska fólkatónleikaran Bill Bourne*

Sunnukvøldið vitjaðu føroyska songkvinnan Eivør Pálsdóttir og kanadiski fólkatónleikarin Bill Bourne á sandinum í Syðrugøtu. Har hugdu tey eftir umstøðunum til framførsluna, sum tey skulu hava í Føroyum.

Eivør og Bourne hava tikið seg saman um at syngja og spæla á G! festivalinum, sum verður hildin um vikuskiftið, og í løtuni fyrireika tey seg til hesa framførslu.

BillBourne er kendur kring alt Kanada fyri sín tónleik, og hann hevur eisini vunnið onkrar virðislønir fyri sínar útgávur. Millum annað kanadiska Grammy og Juno Awards, sum tað verður rópt.

Eivør Pálsdóttir kennir hvørt mansbarn her á landið. Hon fekk sítt gjøgnumbrot sum sangari í bólkinum Clickhaze, men seinastu árini hevur hon arbeitt mest einsamøll og hevur fingið gjøgnumbrot í Íslandi, har hon er nærum eins kend sum í Føroyum.

## Nýggja fløgu

Samstarvið millum Eivør og Bill Bourne skal eftir ætlan halda fram eftir G! festivalin. Møguliga verður onkrar framførslur afturat á skránni, og ætlanin er eisini, at Eivør og Bourne í felag skulu framleiða næstu fløguna hjá Eivør, sum skal koma út seinni í ár ella næsta ár.

Seinasta solofløgan hjá Eivør, Krákan, stóð seg sera væl í Føroyum og í Íslandi, har hon var millum mest seldu fløgurnar eitt tíðarskeiði.

Eivør og Bill Bourne spæla á G! festivalinum fríggjakvøldið. Tey fara fyri tað mesta at spæla sangir hjá Eivør, men eisini okkurt hjá Bourne verður á skránni.

# Vitjan av Århus Studiekor

**Í døgunum 16. til 23. juli vitjar Århus Studiekor í Føroyum**

TÍÐINDASKRIV



*Århus Studiekor. Myndin er tikin í Vor Frue Kirke í sambandi við 50 ára jubilæum hjá kórinum*

Århus Studiekor var stovnað í 1953 og er við sínum 60 sangarum eitt av teimum størstu blandaðu kórunum í Århus. Kórið er klassiskt við einum kirkjuligum og einum vertsligum programmi, ið er samansett av bæði nýggjum og gomlum kórverkum. Kórið viðvirkar ofta í sambandi við konsertir hjá Århus symfoniorkestur og skipar harumframt fyri sínum egnum konsertum.

Kórið skipar javnan fyri uttanlandaferðum og hevur m.a. sungið í Ísrael, Wales, Ungarn, Noreg, Letlandi, Frankaríki, Islandi, Írlandi og Italiu.

Kórleiðarin hjá Århus Studiekor síðan 1995 er Niels Nørgaard. Hann er útbúgvin sum kór- og orkesturleiðari á »Det Jydske Musikkonservatorium« í Århus og undirvísir til dagligt í kór/orkesturleiðslu á »Musikvidenskabeligt institut« á Universitetinum í Århus. Harumframt syngur hann í tí vælkenda sangbólkinum »Basix«.

Á vitjanini í Føroyum verða tvær kirkjukonsertir, sunnudagin 18. juli kl. 19.30 í Gøtu Kirkju og týsdagin 20. juli kl. 19.30 í Christianskirkjuni. Harumframt luttekur kórið á gudstænastuni í Gøtu Kirkju sunnumorgunin 18. juli kl. 18.30. Hendan dagin er felagskórið Gøta Leirvík vertur fyri kórinum, og vitjað verður m.a. í Blásastovu og á Tøting.

Seinni í vikuni verða tvær meira vertsligar konsertir, ein í Tórshavnar Kommunuskúla mikudagin 19. juli kl. 20 og ein í skúlanum á Giljanesi hósdagin tann 20. juli kl. 19.30. Allar konsertirnar eru ókeypis.

Millum konsertirnar hava kórsangararnir høvi at síggja landi, m.a.við at fara gongutúrar í fjøllunum og ætlanin er eisini at fara ein túr í Vestmannabjørgini og har royna akustikkin undir Vestmannbjørgunum.

Føroyingar kunnu við hesi vitjan gleða til at hoyra kórsang á høgum støði. Um onkur hevur áhuga at vita meir um kórið, kunnu tey fara inn á heimasíðuna hjá kórinum.



# Krokodillu ella hund

**Tann 12. juli vórðu tvær nýggjar kunngerðir lýstar viðvíkjandi innflutningi av hundum, kettum og øðrum kelidjorum. Tískil eru reglurnar fyri innflutning av kelidjórum broyttar**

KELIDJÓR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

Tað eru bert fólk búsitandi í Føroyum, sum kunnu flyta kelidjór til Føroya. Ikki er loyvt at innflyta kelidjór, sum steðga í styttri tíðarskeið enn tríggjar mánaðir. Hetta skrivar Heilsufrøðiliga Starvsstovan í tíðindaskrivi.

## Bert føroyskt

Bert kelidjór, sum vanliga hoyra heima í føroysku náttúruni, kunnu flytast til landið. Tað vil siga, at eksotisk kelidjór kunnu sum meginregla ikki innflytast. Men hóast tað, so kunnu fólk søkja um undantaksloyvi, um talan er um ikki-vandamikil eksotisk kelidjór. Henda umsókn skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovu, og innflutningsloyvi kostar 365 krónur. Øll kelidjór uttan hundur og ketta skulu hava innflutningsloyvi, áðrenn tey verða innflutt til Føroya.

## Tatovera hundin

Djórini skulu eisini verða eyðmerkt, áðrenn tey verða innflutt. Hundur og ketta skulu antin hava mikrosendara undir húðini ella tatovering í oyra ella lærkika. Umframt tað skulu djórini verða koppsett, áðrenn tey koma til Føroya. Koppsetingin skal gerast í fyrsta lagi eitt ár og í seinasta lagi ein mánað, áðrenn tey verða innflutt.

## Heilsuváttan til djórið

Tá nýggju kelidjórini koma til Føroya, skulu tey hava eina heilsuváttan. Henda skal ikki vera eldri enn 48 tímar, tá ið djórini byrja ferðina til Føroyar. Ein djóralækni skal vátta, at djórini eru frísk, og at tey hava fingið allar neyðugar viðgerðir. Umframt tað skal ein embætisdjóralækni skriva undir heilsuváttanina. Henda váttan kann fáast frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni ella á teirra heimasíðu www.hfs.fo.

## Hvølpar og kettlingar

Hundahvølpar og kettlingar skulu hava somu heilsuváttan sum hundar og kettur.

Tá ið kelidjórini verða innflutt til Føroya, kannar Tolleftirlitið innflutningsloyvini og heilsuváttanina. Tolleftirlitið sendir eitt avrit til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, sum hevur eftirlit við innfluttum djórum og hevur mynduleika at nokta innflutningi.

## Avlívast, sendast heim, ella viðgerast

Tað kann gerast neyðugt at nokta innflutningi, um illgruni er um smittandi sjúku, vantandi innflutningsloyvi ella heilsváttan, ella um heilsuváttanin ikki er útfylt til fulnar. Um okkurt av hesum hendir, so avtalar Heilsufrøðiliga Starvsstovan við eigaran, um djórið skal sendast aftur, um tað skal setast í sóttarhald, um tað skal koppsetast og viðgerast, ella um djórið skal verða avlívað.

## Eigarin rindar

Tað er innflytarin sjálvur, sum rindar allar útreiðslur í sambandi við innflutning av djórunum.

Hesar kunngerðir, sum fyriskriva omanfyristandandi, eita Kunngerð nr. 15 frá 7. apríl 2004 um innflutning av hundum, kettum og øðrum kelidjórum og Kunngerð nr. 14 frá 7. apríl 2004 um innflutning av eksotiskum djórum.

Eru spurningar hesum viðíkjandi, ber til at venda sær til Heilsufrøðiligu Starvsstovuna á telefon 356400.



*Nýggj kunngerð ger tað léttari hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at fylgja við, hvørji djór koma til landið. Eitt nú fleiri hundar koma til landið, men eksotisk djór koma eisini. Tey flestu av hesum eksotisku er forboðin, men tey fækka í tali*

# Forða tí óføroyska

**Ingibjørg Egholm er eftirlitsfólk hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni. Hon sigur, at nýggju kunngerðirnar forða fyri, at kelidjór, sum ikki hoyra heima í Føroyum, koma til Føroya**

KELIDJÓR
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



- Tað hava verið nøkur kelidjór, sum eru komin til Føroya og eru send avstað aftur. Men nú er tað soleiðis, at Tollvaldið kannar øll pappírini, og um alt ikki er í lagi, so verður Heilsufrøðiliga Starvsstovan boðsend at taka sær av tí. Síðan verður avgerð tikin, hvat verður gjørt við tey, sigur Ingibjørg Egholm frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Sum regul senda fólk umsókn, og nøkur fáa játtandi svar og onnur noktandi svar. Tey djórini, sum ikki sleppa til Føroya, eru tey, sum ikki hóska til føroysku náttúruna. Hesi kunnu gera skaða í føroysku náttúruni, til dømis slangur, sum kunnu hava smittu við sær.

– Djór sum minkar og vaskibjarnir sleppa ikki inn, tí um tey sleppa leys í føroysku náttúruni, so kunnu tey gera skaða. Hetta er so ein meting, vit gera, tá talan um serlig djór, sigur Ingibjørg Egholm.

– Teir flestu fyrispurningarnir snúgva seg um hundar. Og tað eru nakrir hundar, sum ikki eru loyvdir í Føroyum. Til dømis hava vit fingið fyrispurningar um bull-terrier hundar, men tey hundasløgini eru ikki loyvd. Hesir hundar eru gamlir kamphundar, og eftir kunngerðini er ikki loyvt at innflyta kamphundar, tí hesir kunnu vísa aggressivan atburð, sigur Ingibjørg Egholm frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

## Pláss er fyri tær

Nøkur pláss eru enn eftir á útbúgvingunum, sum byrja á Fróðskaparsetrinum í heyst. Á Føroyamálsdeildini verður tikið upp til B.A.. og M.A. lestur í føroyskum máli og bókmentum. Á Náttúruvísindadeildini verður tikið upp til B.Sc. -lestur í ravmagnsverkfrøði, kolvetnisverkfrøði, jarðalisfrøði, teldufrøði og lívfrøði. Á Søgu- og Samfelagsdeildini verður tikið upp til hjánám í søgu og stjórnmálafrøði.

Upptøkutreytin hjá Fróðskaparsetrinum er, at tú hevur miðnámsprógv ella samsvarandi kunnleika. Umsóknarbløð og kunning fæst á heimasíðuni hjá Fróðskaparsetrinum www.setur.fo.

Umsóknir skulu sendast til Fróðskaparsetur Føroya, J.C. Svabos gøtu 14, Postrúm 272, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er tann 5. august, men fyri Søgu- og Samfelagsdeildina er umsóknarfreistin tann 1. august.

**-hkm**

## Laksa- og Sølutorg í Runavík

Leygardagin 17. juli verður árliga Laksa- og sølutorgið í Runavík. Møguleiki verður at royna ein góðan bita av laksi hendan dagin. Kokkur er á staðnum og gevur góð ráð til tey vitjandi. Á útimarknaðinum kanst tú millum annað keypa ferskan fisk, frukt og grønt, klæðir og lopputing. Eisini ber til at keypa sær ein kopp av kaffi við onkrun góðum afturvið.

Fólkatónleikarar og spælimenn, sum luttaka á G! Festivalinum hetta sama vikuskiftið, verða at hoyra á pallinum á torginum. Byrjað verður kl. 12.00 við Kára Sverrisson og Agnar Lamhauge úr Enekk, sum spæla og syngja egnar sangir. Kl. 13.00 verður 15 ára gamla fiólstjørnan Gemma úr Hetlandi at hoyra saman við klaverleikaranum Isobel, sum eisini er úr Hetlandi. Kl. 14.00 spælir Basiru Mjai úr Gambia á afrikanskar trummur. Laksa- og sølutorgið er frá kl. 12.00 til kl. 17.00.